Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um lóggávuvaldið hjá Løgtinginum, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen, (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Heldur løgmaður, at danska Fólkatingið kann samtykkja lóggávu á einum málsøki, sum føroyskir myndugleikar hava yvirtikið?

Viðmerkingar:
Í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya er ásett í **§ 1:** "Í yvirtiknum málum er lóggávuvaldið hjá løgtinginum og løgmanni í felag. Útinnandi valdið er hjá landsstýrinum. Dómsvaldið er hjá dómstólunum."

Tí verður løgmaður spurdur, um hann heldur, at danska Fólkatingið kann samtykkja lóggávu á einum málsøki, sum føroyskir myndugleikar hava yvirtikið.

Á Løgtingi, 24. november 2020

Høgni Hoydal